Vinnan

VINNUTÍÐINDI í Sosialinum fast hvønn týsdag
– eisini aðrar dagar

# Smyril Line brynjar seg til SUMMARSIGLING

**Sosialurin hevur vitjað inni á gólvinum hjá Jákupi Sverra Kass, sølu-og marknaðarstjóra á Smyril Line. Vit hava tosað við hann um páskatúrar, summarferðaætlan og um Norrønu, sum eitt nú er umbygd til betur at nøkta tørvin hjá ferðafólki**




UTTANLANDSSIGLING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Summarferðaætlanin hjá Smyril Line verður borin í hvørt hús týskvøldið í næstu viku.

- Okkara útboð vendir sær serliga til familjur, sum við egnum bili ynskja at vitja í okkara grannalondum, til pør, sum ferðast og vilja uppliva okkurt saman – og til einstaklingar, sum vilja koma sær á eina ferð út um landoddarnar, sigur sølu-og marknaðarstjórin.

## Njótið frælsið

Aftur í summar hava føroyingar høvi at vitja í Íslandi, Skotlandi, Noregi og Danmark, eins og útlendingar hava høvi at vitja okkum – ella onnur ferðamál, sum Smyril Line hevur í sínari vøruskrá.

- Pakkið bilin í túninum, takið alt við, sum tykkum nýtist á ferðini, koyrið umborð á Norrønu, hugnið tykkum í vælsignaðum friði og farið so frísk og væl hvíld í land. Koyrið hagar, tit vilja, og steðgið har, tit vilja – og koyrið so víðari, tá ið tit vilja.

Soleiðis ljóðar teksturin á einum av fyrstu síðunum í blaðnum, sum skjótt verður borið í hvørt hús.

Og lagt verður aftrat:

- Njótið frælsið, ið kemst av at ferðast í egnum bili – og njótið at sleppa undan at dragsa kuffert, tinganest og lutir aftur og fram úr Føroyum.

Í ferðaætlanini hómast eisini eitt pinkalítið ”prik” til kappingarneytan í luftini, Atlantsflog:

- Tykkum nýtist ikki at stúra fyri, at okkurt liggur eftir – hvørki á út-ella heimferð. Við Norrønu fáa tit alt við!

## Nógv spyrja

Eitt er sjálv summarferðaætlanin hjá Norrønu, sum byrjar um hálvan juni og sjálvandi hevur alstóran áhuga millum føroyingar. Annað er so tað, sum liggur uppaftur nærri – páskatúrarnir.

- Fólk eru langt síðan farin at spyrja eftir páskatúrunum, sum eru sera vælumtóktir, sigur sølu-og marknaðarstjórin.

Hann vísir á, at Norrøna fer í dokk í Hamburg um miðjan februar, har stabilisatorarnir, sum fórust ringa túrin í november, skulu umvælast. Skipið fer tá fyrsta túrin úr aftur Føroyum 28. februar í vanligari sigling millum Føroyar og meginlandið.

- Vit hava havt nakrar óvanligar avbjóðingar seinastu tíðina, og hetta hevur skapt ein ávísan ótryggleika um okkara siglingarætlan

*- Vit hava broytt fráfaringar-og komutíðir, soleiðis at føroyingar ikki longur nýtast at fara upp á miðjari nátt. Vit hava soleiðis fingið meira ”luft” í ferðaætlanina, sum eisini verður til bata fyri tey ferðandi, sigur sølu-og marknaðarstjórin á Smyril Line, Jákup Sverri Kass*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*